TALGILDU
FØROYAR
01100110 01101111




# Talgildingin av samfelagnum heldur fram

**Heildarætlan fyri talgilding av samfelagstænastum árini 2025 – 2027**

# **Innihalds-** yvirlit


Saman um einar talgildar Føroyar .......... **4**

Meginreglur fyri talgilding .......... **8**

**VISIÓN 1:** Ein myndugleiki fyri talgilding .......... **10**

*1. átak: Myndugleiki fyri talgilding setast á stovn*

*2. átak: Tættari samstarv við kommunur og vinnu*

**VISIÓN 2:** Samanhangandi tænastur fyri borgara og vinnu .......... **14**

*3. átak: Vangin 2.0 - nýhugsan og útbreiðsla*

*4. átak: Savna heilsutænastur á Vanganum*

*5. átak: Mínboks til vinnuna og nýggjar funkur*

*6. átak: Skjáttan við fleiri kortum og møguleikum*

*7. átak: Talgild val*

*8. átak: Vinnutænastur á einum stað*

**VISIÓN 3:** Munadygg umsiting .......... **22**

*9. átak: Størri gagnnýtsla av Landsfólkayvirlitinum*

*10. átak: Knýta persónsdátur í Norðurlondum saman*

*11. átak: Ríkisstovnar nýta talgilda undirstøðukervið*

*12. átak: Samleikin brúkast uttanlands*

*13. átak: Talgild kirkjubók*

*14. átak: Ein almenn bankakonta*

*15. átak: Nýtsla av nýggjari tøkni*

**FYLGISKJAL:** Íløguætlan fyri árini 2025-2027 .......... **28**

# **Saman** um einar **talgildar Føroyar**

**Við hesari heildarætlanini fyri 2025–2027 hevur Landsstýrið sett sær fyri, at talgilding framhaldandi skal vera drívmegi til vøkstur, tryggjan av vælferð og einum munadyggari almennum geira. Heildarætlanin er framhald av ætlanini fyri 2016–2020 og ta menning, ið hevur verið síðan. Harumframt eru niðurstøðurnar hjá KST arbeiðsbólkinum í Vakstrarforum[1] brúktar til at seta hesa heildarætlan saman.**

Føroyar hava ment seg nógv, síðan sjøtul varð settur á fyrstu heildarætlanina fyri talgilding av samfelagnum í 2015. Vit hava í dag eitt fyrstafloks talgilt undirstøðukervi, sum er grundarlagið undir talgilding av tænastum frá almennum eins væl og privatum tænastuveitarum. Vit eru eitt talgilt framkomið land, har borgarar kunnu samskifta trygt og lætt talgilt.

Felags loysnir sum Samleikin og Vangin eru vorðin fólkaogn og eru við til at lætta um gerandisdagin hjá føroyingum.

Gott 46.000 fólk hava fingið sær **Samleikan** og harvið atgongd til tað vaksandi talið av tænastum, bæði almennum og privatum, ið brúka Samleikan til eyðmerking og undirskrift. Bankar tryggingarfeløg o.o. hava tikið Samleikan í brúk, tí tað gevur eitt trygt og brúkaravinarligt grundarlag fyri talgildum samskifti.

***1)** KST Vakstrarforum varð tíðaravmarkað verkætlan frá februar 2021 til juni 2022. Íblásturin til tilmælini hjá KST bólkinum stava í stóran mun frá stórari kt-verkstovu, ið varð hildin í Norðurlandahúsinum í 2021. Eini 180 fólk úr kt-vinnuni, fiski- og alivinnuni, fíggjarvinnuni, vinnuframaøkinum, almennu fyrisitingini, heilsu- og almannageiranum, mentan, undirvísing, ferðavinnu, orku- og umhvørvi og nógv onnur luttóku á verkstovuni. Evnið var, hvussu skapa vit vøkstur í føroysku kt-vinnuni við atliti til øll samfelagsøki.*



**Vangin** veksur alsamt. Kommunur og almennir stovnar bjóða føroyingum eina felags inngongd til at avgreiða síni persónligu viðurskifti, har dátutrygd, atkoma og brúkaravinsemi eru í hásæti. Móttøkan er góð, og tænastuveitarar boða frá, at ferðslan bara veksur.

**Heldin** er snúningsdepilin í allari almennari talgilding og grundarlagið undir tryggum flutningi av dátum úr og millum almennar skráir. Heldin er í dag skipað í rundskrivi, og í sambandi við nýggju nettrygdarlógina verður Heldin ein enn meiri týðandi partur í at skipa nettrygdina í samfelagnum.

**Grundardáturnar:** *Fólkayvirlit, tinglýsing, matrikul- og kortdátur* eru vorðnar lættari atkomuligar og ókeypis at brúka.

**Virkið**, sum er seinasti táttur í fyrstu heildarætlanini frá 2015 at seta í verk, er ávegis og verður eitt stórt frambrot fyri føroyskt vinnulív tog almennu umsitingina.

**Skjáttan**, sum upprunaliga ikki var partur av heildarætlanini, gevur í dag borgarum ein lættari gerandisdag, tá talan er um at prógva sín samleika t.d. í ferðsluni, og aðrastaðni, har tørvur er at prógva aldur o.a.

Hesi átøk gera tað lætt og skjótt hjá borgarum, vinnu og myndugleikum at samskifta á ein tryggan, einfaldan og nútímans hátt. Mannagongdir eru lættari og effektivari, og meira orka er til aðrar uppgávur. Við hesum eru lunnar lagdir undir framtíðar menning og vøkstur.

Hetta hevur latið seg gjørt við politiskum vilja og framsøkni. Eitt nú við breiða samstarvinum millum land, kommunur og vinnu. Harumframt hava borgarar og starvsfólk í stóran mun verið búgvin og til reiðar til stóru broytingarnar, sum talgildingin hevur við sær.

Næsta stigið á talgildu leiðini er at fáa enn størri gagnnýtslu og fulla nyttu av undirstøðukervinum.

Føroyar standa fyri stórum haldførisavbjóðingum. Hesar krevja, at vit hugsa øðrvísi og broyta, hvussu vit veita okkara vælferðartænastur. Við eini heildarætlan fyri alt samfelagið er eitt av málunum, at talgildingin verður eitt av amboðunum at loysa stóru avbjóðingarnar við haldførinum. Heildarætlanin leggur dent á, hvussu samfelagið kann brúka dátur og nýggja tøkni, sum vitlíki og tólmenni, til at skipa tilfeingi betri og gera arbeiðsgongdir einfaldari. Hetta hevur við sær, at starvsfólk innan eitt nú eldra- og sjúkrarøkt fáa meira tíð at veita týdningarmestu tænasturnar í samfelagnum.

Talgilding hevur stórar møguleikar við sær, men ger okkum samstundis meira viðbrekin, bæði sum einstaklingar og sum samfelag. Átøkini í heildarætlanini taka fyrilit fyri, at nettrygd verður høgt raðfest. Tað er av alstórum týdningi, at vit lúka krøv um trygd og hava neyðugu skipanirnar til at verja okkara dátur og undirstøðukervi. Fyri einstaklingin kann talgilding hava við sær, at hann ikki megnar at fylgja við í talgilda rákinum. Tað krevur, at vit veita stuðul til teirra, ið hava tørv á hjálp. Heildarætlanin tekur fyrilit fyri, at almennar tænastuveitingar framhaldandi verða skipaðar soleiðis, at øll fáa javnbjóðis atgongd til vælferðarsamfelagið.

Tað verður talgildað á fleiri mótum í samfelagnum. Umframt felags loysnirnar hjá Talgildu Føroyum, bæði tær sum eru mentar, og tær sum eru ávegis í hesari heildarætlan, eru stórar og samfelagstýðandi loysnir ávegis. Kervið+ hjá Undirvísingarstýrinum, Talgilda Heilsuskipanin hjá heilsuverkinum, Kjarnan hjá Taks, og talgilda tinglýsingin hjá Umhvørvisstovuni eru fýra av stóru og týðandi verkætlanunum, ið eru í gongd og stuðla undir talgildingini av samfelagnum. Tað er av stórum týdningi, at hesi stóru tøk innan talgilding eru samskipaði og hava eina felags kós. Hesa uppgávu fær nýggi talgildingarmyndugleikin, sum er ein av stóru átøkunum í hesari heildarætlanini, til uppgávu at seta í verk, sí niðanfyri.

Heildarætlanin 2025–2027 er býtt í tríggjar serstakar visjónir, ið hvør sær hava átøk, sum skulu fremja ætlanina í verki.



## 1// Ein myndugleiki fyri talgilding

Í fyrstu heildarætlanini, 2015–2020, var eitt av aðalmálunum, at land, kommunur og vinna samstarvaðu um uppgávuna at talgilda samfelagið. Nú er málið at fara eitt stig longri og seta á stovn ein myndugleika, ið stendur fyri yvirskipaðu talgildingini.

Eitt av málunum hjá nýggja myndugleikanum er at seta krøv um, at kt-verkætlanir í størri mun skulu arbeiða við at greina og máta nyttu av teirra loysnum. Kannast skal eisini, um tað er skilagott at áseta ein fastan íløgukarm til talgilding, har tær kt-verkætlanir, sum hava størstu samfelagsnyttuna, fáa hægstu raðfesting. Hetta skal tryggja støðufesti og eina støðuga menning av tænastum í vælferðarsamfelagnum.

Myndugleikin skal eisini skipa samstarv við vinnuna, so alt samfelagið fær ágóðan.

## 2// Samanhangandi tænastur fyri borgarar og vinnu

Vangin savnar tænastur frá landi, kommunum og vinnu og ger tær lætt atkomuligar fyri borgarar.

Heildarætlanin leggur dent á at styrkja samstarvið tvørtur um geirar, so tænasturnar gerast meiri samanhangandi og effektivar. Serlig atlit verða tikin til at fáa heilsudátur og -tænastur atkomuligar talgilt.

Samstundis skal vinnan hava góðar møguleikar at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna talgilt. Við einum virkisvanga fer tað at bera til hjá vinnuni at fáa líknandi tænastur, sum borgarar kenna á Vanganum.

## 3// Munadygg umsiting

Fyrisitingarligar uppgávur og mannagongdir skulu framhaldandi effektiviserast. Vit skulu m.a. fáa enn meira burturúr okkara landsfólkayvirliti, vit skulu kunna knýta persóns-upplýsingar við onnur lond, Samleikin skal kunna brúkast uttanlands, og vit skulu gagnnýta møguleikarnar við at ríkisstovnar knýta í føroyska talgilda undirstøðukervið.

Harumframt skulu vit fyrireika okkum til eitt samfelag við vitlíki, tólmennum, talukennara og aðrari tøkni. Vit skulu tora at vera nýskapandi. Hetta krevur karmar, so vit framhaldandi hava tamarhald á tøknini. Neyðugt er at gera eina langtíðarætlan fyri, hvussu vit brúka hesa tøkni.

Hesar visjónirnar verða lýstar á næstu síðunum.

# Meginreglur fyri **talgildingini**

**Eins og í heildarætlanini 2016–2020 skal arbeiðið í heildarætlanini grundast á meginreglur, sum eru afturvendandi í øllum átøkum og verkætlanum, sum verða mentar og settar í verk.**

Endamálið er at leggja lunnar undir skilagóðar mannagongdir sum tryggja, at øll átøk og allar verkætlanir stuðla undir felags máli fyri talgilding av samfelagnum. Meginreglurnar tryggja eina samanhangandi og skynsama talgilding, sum gagnar bæði borgarum og samfelagnum sum heild. Talgilding skal byggja álit, gjøgnumskygni og virðing fyri føroyska samfelagnum.

Hesar meginreglur eiga sostatt eisini at síggjast sum góður siður, tá arbeitt verður við samfelagstýðandi kt-verkætlanum. Eisini tær, sum ikki eru partur av Talgildu Føroyum.



## TALGILDING FYRI ØLL

Talgilding hevur broytt okkara gerandisdag. Samstundis sum fleiri og fleiri tænastur gerast talgildar, setast nýggj krøv til borgarar um loysnir, trygd og førleikar. Tað, sum er lætt fyri nøkur, er torført fyri onnur. Talgildar loysnir skulu mennast soleiðis, at allir borgarar kunnu vera við og lúka krøvum um talgilda atkomu.

Førleikamenning innan kt verður raðfest, og serlig frálæra og vegleiðing verður bjóðað teimum, ið hava tørv á tí. Harumframt verður miðað eftir at brúka nýggja tøkni innan vitlíki og tólmenni, at veita góða tænastu á ymiskum málum og til ymiskan tørv.

## DÁTUETIKKUR

Dátuetikkur snýr seg um, hvussu vit savna, brúka og deila dátur við virðing fyri siðum og fyri einstaklinginum. Fyri at røkka fyrimunum, sum fáast við nýtslu av dátum, skulu etiskir spurningar viðgerast, áðrenn skipanir verða mentar. Vit skulu taka hædd fyri rættindum, rættartrygd og samfelagsvirðunum hjá borgarum.

## BORGARIN Í MIÐDEPILIN

Almennir myndugleikar skulu samstarva um menningina av talgildum tænastum. Borgarin skal vera í miðdeplinum av talgildu vælferðini. Tað skal vera minni súluhugsan og meira borgarahugsan.

## VIT SAMSTARVA OG DEILA VITAN

Tá ið vit talgilda, tryggja vit, at okkara vitan og loysnir verða brúktar og endurnýttar tvørtur um geirar. Skipanir og funkur skulu endurnýtast og ikki enduruppfinnast. Vit eggja til at deila vitan og førleikar, so vit kunnu síggja nýggjar møguleikar og loysa samfelagsavbjóðingar í felag.

## UPPLÝSINGAR SKULU BARA LATAST EINA FERÐ

Myndugleikar skulu við samtykki kunna brúka upplýsingar, sum longu finnast í øðrum almennum skráum. Myndugleikar skulu, umvegis Heldina, brúka dátur úr kelduskráum, heldur enn at byggja egnar skráir, m.a. brúka dátur úr fólkayvirlitinum um tørvur er á upplýsingar um borgarar. Hetta hækkar um dátugóðskuna og minkar um umsiting av skráum. Vit skulu fylgja sokallaða *Once Only Principle.*

## LÓGGÁVA HUGSAST Í TALGILDING

Raðfest verður at tryggja, at nýggj lóggáva er búgvin til at talgilda samfelagið og stuðlar undir einum effektivum og brúkaravinarligum gerandisdegi. Lóggáva skal stuðla undir talgildingina, og at kt-verkætlanir lúka lógarinnar krøv. Hetta er við til at styrkja rættartrygdina í talgilda samfelagnum og tryggja, at lóggávan samsvarar við tøkni og framtíðar tørv.

## GREINING OG MÁTING AV NYTTU

Allar verkætlanir eiga at verða grundaðar á eina nyttugreining, áðrenn tær verða settar í verk, og mátingar av nyttuni eiga at verða gjørdar regluliga, eftir at verkætlanirnar eru settar í verk. Við skipaðum greiningum og mátingum tryggja vit, at átøkini skapa veruligt virði fyri borgarar, vinnu og samfelag. Greiningarnar eru grundarlag fyri at taka støðu til, um verkætlan skal setast í gongd, meðan mátingarnar staðfesta, hvør nyttan er, og um langtíðarhaldførið verður styrkt. Harumframt eru nyttumátingar ein lykil til læru og menning, so loysnirnar støðugt verða lagaðar eftir veruligum tørvi og broyttum umstøðum.

# VISIÓN 1:

# EIN MYNDUGLEIKI FYRI TALGILDING



**Við einum felags myndugleika fæst sum mest burturúr landsins tilfeingi innan talgilding. Málið er at seta á stovn ein myndugleika fyri talgilding av samfelagnum. Ein felags myndugleika fyri landið, sum skal standa fyri at samskipa og samstarva um talgilding við kommunur og vinnuna, soleiðis at vit hava eina felags talgilda kós fyri samfelagið. Við støði í rundskrivi fær myndugleikin neyðugu heimildirnar at tryggja, at geirar og súlur ikki eru forðing fyri at veita borgarum og vinnu samanhangandi og effektivar talgildar tænastur.**

Myndugleikin skal menna og reka felags talgilda undirstøðukervið. Hann skal standa fyri at leggja ætlanir fyri talgilding av samfelagnum, samskipa yvirskipaðu átøkini, orða og seta út í kortið og seta krøv og vegleiða um, m.a. kt-arkitektur, verkætlanarleiðslu, brúkaravinsemi og gerð av nyttugreiningum og -mátingum av kt-verkætlanum.

Virksemið, sum fer fram á stovnum hjá landi og kommunum innan KT og talgilding, tørvar betri samskipan. Vantandi samskipan og samstarv hevur við sær, at samfelagsgagnið av teimum íløgum, sum verða gjørdar í KT og talgilding, kundi verið mun-andi størri. Meira kann gerast burturúr at gagnnýta verandi loysnir og undirstøðukervi, og skipa fyri felags átøkum innan innkeyp, menning og rakstur, soleiðis, at sum mest fæst fyri íløgurnar, og gagnið av átøkunum verður størri.

Grundarlagið fyri einum slíkum myndugleika finst í stóran mun longu í dag við virkseminum á Gjald-stovuni: Talgildu Føroyar og KT Landsins. Her finnast førleikar og royndir at standa fyri felags almennari leiðslu av menning og rakstri innan KT og talgilding. Talan er ikki um nýggjan stovn, men í staðin at víðka um virksemið hjá Gjald-stovuni til eisini at umfata myndugleika uppgávur fyri talgilding

### 1. ÁTAK
## Myndugleiki fyri talgilding setast á stovn

Landsstýrið hevur sett sjøtul á at skipa myndug-leika fyri talgilding, sum verður staðfestur í rundskrivi og kemur at fevna um virksemið hjá landinum. Myndugleikin fær til uppgávu at menna og reka felags talgilda undirstøðukervið hjá landinum, standa fyri at orða heildarætlanir og politikkir fyri talgilding, seta krøv til kt-verkætlanir og -loysnir, veita ráð og vegleiðing til stovnar í sambandi við kt-verkætlanir og -loysnir og hava heimild at standa fyri samskifti og samstarvi við kommunur og vinnu um viðurskifti, sum ganga tvørturum geirar.

Sum part av arbeiðinum við nýggjum myndug leika fyri talgilding hevur Landsstýrið sett sær sum mál at broyta játtanarskipanina soleiðis, at stovnar kunnu avskriva kt-íløgur, og at kanna nærri, um tað er skilagott við einum føstum íløgukarmi fyri talgilding. Ein íløgukarmur, har stovnar við støði í nyttugreiningum kunnu søkja um pengar til menning av kt-loysnum.

*januar 2025*

**46.000**

*SAMLEIKAR*

### 2. ÁTAK
## Tættari samstarv við kommunur og vinnu

Talgildu Føroyar hava gott samstarv við kommun-urnar um menning av tænastum á Vanganum. Flestu kommunur eru partur av Vanganum. Í felag menna kommunurnar tænastur til borgarar sínar, so allir føroyingar fáa atgongd til sama støði av tænastum.

Skal meira fáast burturúr tilfeinginum innan talgilding, krevst eitt meira skipað samstarv. Kommunurnar hava í dag ábyrgdina av týðandi og krevjandi málsøkjum, sum t.d. eldraøkið, sum fær stórt gagn av felags átøkum innan talgilding. Avgerandi er tó, at hesi eru samskipað millum kommunur og landið, sum varðar av yvirskipaðu talgildingini.

Tá myndugleikin er farin at virka fyri landið, skal samskifti takast upp við kommunur um at gerast partur av myndugleikanum fyri talgilding og partur av einum føstum íløgukarmi.

Myndugleikin skal eisini standa fyri tættari samstarvi við vinnuna um felags áhugamál innan talgilding av samfelagnum. Eitt forum fyri talgilding skal skipast, har vinnan og landið - møguliga saman við kommunum - viðgera talgildingina av samfelagnum.

## VISIÓN 2:

# SAMAN-HANGANDI TÆNASTUR FYRI BORGARAR OG VINNU



## Samskifti og veitingar til borgarar og vinnu skulu verða smidlig og trygg.

Flestu almennir stovnar og kommunur eru tøkar á Vanganum og geva borgarum eina alsamt meira samanhangandi brúkaraatferð, størri gjøgnumskygni og betri tænastu. Talgilding av heilsudátum og -tænastum verður eitt aðalmál. Stóra kt-verkætlanin hjá Sjúkrahúsverkinum hevur í sínum strategiskjali tænastur á Vanganum til borgarar, sum ein týðandi tátt.

Skjáttan skal mennast víðari, so vit kunnu savna almenn loyvi, prógv og aðrar upplýsingar á einum stað. Við Skjáttuni fáa vit talgildu fyrimunirnar við í okkara gerandisdag og gera dagligar avgreiðslur einfaldari og smidligari.

Brúkaratferðir grundaðar á lívsstøður skulu allýsast og greinast, so vit fáa meira samanhangandi tænastur, og borgarar verða betur fyri sjálvir at avgreiða síni viðurskifti tvørturum myndugleikar. Vitlíki kann gerast ein týðandi táttur at náa hesum máli.

Virkið verður eitt stórt frambrot innan føroyska talgilding. Virkið skapar grundarlag fyri at menna almennar tænastur til vinnuna á sama hátt, sum vit kenna tað við Vanganum. Vinnan skal hava einar dyr at venda sær til í talgilda samskiftinum við tað almenna. Hetta krevur eisini, at vinnan fær ein talgildan postkassa sum Mínboks, ið kann brúkast at samskifta við tað almenna, sínámillum og við borgarar.





3. ÁTAK:

## Vangin 2.0 – nýhugsan og útbreiðsla

Góðar brúkaraupplivingar gera tað lættari hjá borgarum og vinnu at brúka talgildar sjálvgreiðslur. Tað er eisini týðandi, at loysnirnar lúka krøv um fyrisiting, atkomu og trygd. Vangin hevur seinastu árini ment eitt stórt úrval av hentum tænastum, sum almennir stovnar og kommunur kunnu gera gagn av. Hesar eru m.a. kalendarin, felags brúkaraskrá og hópboð. Hesar tænastur skulu breiðast meira út millum tænastuveitararnar, so borgarin fær enn størri gagn av teimum.

Tænastulendið hjá landi og kommunum skal allýsast og greinast. Út frá lívsstøðum og innliti í tørvin hjá borgarunum skulu fleiri brúkaravinarligar tænastur mennast, ið eru lættar at skilja, og arbeitt skal verða tvørtur um stovnar og geirar. Við nýtslu av vitlíki skulu borgarar kunna seta fyrispurningar um persónsmál, har svarið verður framleitt úr dátum, ið vit hava fult tamarhald á. Hetta kunnu vera lógartekstir, vegleiðingar og verklýsingar. Hetta tryggjar, at svarini eru álítandi og nágreinilig. Borgarin skal kenna seg tryggan við krøv og rættindi, og hevur hann tørv á hjálp, skal hann lætt vita, hvar hann kann venda sær.

Slíkar loysnir við vitlíki kunnu eisini brúkast til at veita tænastur á øðrum málum enn føroyskum. Stóra tilflytingin seinastu árini hevur havt við sær, at nógvir útlendingar brúka talgildu tænasturnar. Tí er tað týdningarmikið, at tænasturnar eru atkomuligar og brúkaravinarligar fyri øll.

Alsamt fleiri persónligar upplýsingar skulu gerast tøkar fyri borgaran. Tænastur grundaðar á samtykki skulu gera tað lættari hjá borgaranum at avgreiða síni viðurskifti við fleiri tænastuveitarar í somu brúkaraferð, t.d. sjúkudagpeningur, har borgari, lækni, arbeiðs-gevari og Almannaverkið eru partar av somu brúkaraferð.

Vit skulu kunna hjálpa hvørjum øðrum á Vanganum á sama hátt, sum vit gera í øðrum lívsstøðum. Talgilda fulltrúin skal mennast víðari, so enn fleiri fáa gagn av at fáa hjálp frá avvarðandi talgilt. Talgildar fulltrúir hjá ymsum tænastuveitarum skulu savnast á einum felags yvirliti, so borgarin skjótari kann geva og strika fulltrú og kenna síni rættindi.

## 4. ÁTAK:
## Savna heilsutænastur á Vanganum

Fyrstu stigini at fáa heilsudátur og -tænastur á Vangan hava gingið væl. Apoteksverkið hevur verið framsøkið at fáa dátur og tænastur talgilt út til viðskiftafólk síni. Heilsutrygd hevur sett sína fyrstu sjálvgreiðslu á Vanganum í verk, og Heilsustýrið hevur gjørt stóra talgilda kanning og samskift beinleiðis við borgarar umvegis kalendaran. Samanlagt eru hetta nakrar av mest brúktu tænastunum á Vanganum. Borgarar og tænastuveitarar lata væl at.

Næsta stigið verður at fáa dátur og tænastur frá Sjúkrahúsverkinum á Vangan. Hetta er orðað í strategi fyri nýggju talgildu heilsuskipanina, sum ein týðandi táttur. Borgarar skulu fáa innlit í egnar dátur og kunna samskifta trygt og einfalt umvegis Vangan, m.a. at fáa innkallingar í kalendaran og bíleggja og broyta tíðir/avtalur. Við heildarætlanini skulu vit arbeiða við hesum:

- Bjóða fram videoviðtalur við heilsustarvsfólk. Hetta bøtir munandi um tænastuna hjá fólki, sum hava ringt við at flyta seg, tey uttan fyri miðstaðarøkið, og lættir samstundis nógv um hjá heilsustarvsfólki.
- Í sambandi við ávísa viðgerð, kunnu borgarar senda upplýsingar um t.d. blóðtrýst, vekt og hjáárin av heilivági beinleiðis og trygt til heilsuverkið. Hetta lættir munandi um núverandi mannagongd, og ger avgreiðsluna skjótari.
- Fáa Gigni, Sernám og aðrar myndugleikar á Vangan. Sjúkragongdir hjá eitt nú børnum við serligum tørvi skal gerast lættari, so foreldur lætt við samtykki kunnu samskifta um tørvin hjá barninum.
- Fáa fleiri umsorganartænastur talgildar, so borgarar lætt kunnu søkja og verða sum longst í egnum heimi.

## 5. ÁTAK:
## Mínboks til vinnuna og nýggjar funkur

Mínboks er eitt týðandi amboð í at tryggja samskiftið millum borgarar og tænastuveitarar. Nógvar ábøtur eru gjørdar á talgilda postkassanum, sum nú lýkur krøvini um talgilda atkomu. Eisini er lóg um Mínboks samtykt, sum javnsetur talgildan post við vanligan pappírspost. Lógin ásetur eisini rættarstøðuna um, nær brævið er komið fram.

Farið verður undir at knýta almennu skjalagoymsluna Skjalhald í Mínboks, so tænastuveitarar kunnu samskifta beinleiðis við borgarar úr Skjalhaldi í Mínboks. Hetta verður framstig, ið fer at lætta nógv um arbeiðið hjá málsviðgerum við at stovna og avgreiða mál, samstundis sum krøvini um dátuvernd eru lokin.

Næsta stig verður at gera samskifti í Mínboks smidligari fyri borgarar. Ein greining av framtíðar samskifti skal gerast, sum tekur atlit til, hvussu fólk best samskifta. Eisini skal kannast, um Mínboks skal virka sum ein almenn skjalagoymsla hjá borgarum, har tey fáa atgongd til skjøl, prógv og váttanir.

Vinnan skal eisini fáa talgildan postkassa, ið virkar á sama hátt sum Mínboks. Eftirspurningurin er stórur hjá vinnuni at kunna samskifta beinleiðis við hvønn annan, almennar myndugleikar og borgarar, har vissa er fyri, at viðkvæmar upplýsingar og skjøl verða handfarin á ein tryggan hátt, ið lýkur krøv um dátuvernd.

## 6. ÁTAK:
## Skjáttan við fleiri kortum og møguleikum

Skjáttan, ið hýsir talgildu koyri- og borgarakortini, skal útbyggjast. Við Skjáttuni kunnu vit eyðmerkja okkum trygt og skjótt á bókasøvnum, til blóðroyndir, við uppmøting ymsastaðni ella fyri at prógva aldur. Skjáttan hevur verið væl móttikin og verður í dag brúkt av borgarum í ferðsluni at prógva aldur og til keyp av heilivági í sjálvgreiðsluni hjá Apotekinum.

Øll almenn loyvi, prógv o.a. skulu kunna brúkast í Skjáttuni, og næsta stig verður at samstarva við fleiri tænastuveitarar um at brúka Skjáttuna. Eisini verður farið undir at knýta Skjáttuna í t.d. bókhaldsskipanir, soleiðis at ein uppmøting, har gjald er ein partur, verður skrásett beinleiðis í hesum skipanum og bókað.

Útbreiðslan av Skjáttuni má taka atlit til tey, ið ikki kunnu brúka appina. Foreldur skulu kunna fáa atgongd til børn síni í appini, og ein talgild fulltrú skal gerast, so fólk kunnu fáa hjálp frá avvarðandi, um tey ikki klára tað sjálvi. Harumframt skal umhugsast, hvør annar møguleiki skal bjóðast teimum, ið ikki vilja hava talgilda samleikakortið.

## VANGIN GER TAÐ LÆTTARI

- *innlit í persónliga skrásettar dátur*
- *persónligan kalendara, sum vísir avtalur og freistir*
- *nógvar sjálvgreiðslur til m.a. at senda umsóknir*
- *trygt samskifti umvegis Mínboks*
- *yvirlit yvir viðgerð av málum*



### 7. ÁTAK:
## Talgild val

Møguleikarnir innan talgild val eru stórir, og tað hevur stóran týdning, at alt arbeiðið innan hetta økið verður gjørt við virðing fyri teimum fólkaræðisligu siðum, vit hava í Føroyum.

Fyrstu stigini at talgilda mannagongdir innan val eru longu farin í gongd:

- Til næsta løgtingsval kunnu lesandi uttanlands søkja um upptøku á vallistan á Vanganum. Á henda hátt verður tað munandi skjótari og lættari, og kommunurnar spara tíð og orku til umsiting.
- Tórshavnar kommuna hevur fyrireikað atkvøðugreiðslu til eldraráðsval á Vanganum. Øll neyðug fyrilit eru tikin fyri dulnevni, og at hvør persónur einans hevur eina atkvøðu.
- Fyrireikingar eru byrjaðar at talgilda valkort, so Skjáttan kann brúkast við uppmøting, og vit fáa eina stóra sparing í kostnaði og umsiting.

Eisini er góður møguleiki fyri at brúka Samleikan til at savna uppstillarar til nýggjan politiskan flokk og seta fram borgarauppskot. Harumframt eru góð líkindi fyri at gera talgildar hoyringar í kommunum og áhugafeløgum.

Forkanning verður gjørd um talgild val í Føroyum. Allir týðandi áhugapartar luttaka og verða hoyrdir. Atlit verður tikið at okkara sterku fólkaræðisligu virðum. Kanningin skal lýsa allar møguleikar fyri talgilding av valtilgongdini. Úrslitið verður latið politisku skipanini sum eitt tilmæli.

### 8. ÁTAK:
## Vinnutænastur á einum stað

Virkið verður eitt nýbrot fyri føroyska vinnu. Virkið verður hornasteinur í at menna ein virkisvanga, soleiðis sum borgarar kenna tað á Vanganum. Vinnan skal fáa atgongd til dátur og sjálvgreiðslur frá almennum tænastuveitarum á einum og sama stað. Endamálið er at savna allar upplýsingar um løgfrøðiligar eindir á einum stað. Hetta ger eisini, at almenna fyrisitingin verður betri samansjóðað, og landið sleppur undan dupultum skrásetingum og viðlíkahaldi.

Umfatandi greiningar og raðfestingar skulu gerast av tænastunum, so tær nøkta tørvin hjá vinnuni og lætta um hjá fyrisitingini. Vinnan skal taka lut í at allýsa tørvin. Tað skal vera lætt at geva og strika atgongd hjá starvsfólkum, bókhaldarum, sakførarum o.ø. til skipanina, so tey bara hava neyðug loyvi at arbeiða við.

Við eini felags loysn til vinnuligar sjálvgreiðslur verður tað lættari hjá feløgum at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna á einum stað. Sjálvgreiðslurnar verða mentar eftir einum felags leisti, so tær eru lættar at kenna aftur.



# VISIÓN 3:

# MUNADYGG UMSITING



**Talgilding og nýggj tøkni sum heild skulu setast í verk fyri at skapa ein betri og munadyggari (effektivari) almennan geira. Tøknin er týðandi amboð fyri at loysa vaksandi avbjóðingina við vantandi arbeiðsmegi á alsamt fleiri fakøkjum. Tøkni kann serliga lætta um, tá talan er um einsháttaðar og tungar arbeiðsuppgávur á fyrisitingarligum økjum og innan heilsu- og eldrarøkt. Neyðugt er við nýhugsan, hvussu vælferðartænastur skulu veitast í framtíðini. Tøkni sum vitlíki (AI), tólmenni (Robotics), talukennari og tólnet (IoT) eru lykilin til, at hetta kann eydnast.**

Fyritreytirnar fyri at gera nakað munagott eru góðar. Vit hava fjarskiftiskervi í heimsflokki, bæði í mun til útbreiðslu og tøkni. Talgilda undirstøðukervið er nýmótans, ment til okkara tørv, við loysnum ið lúka altjóða krøv, og sum alt okkara samfelag brúkar. Hóast vit mangla nógv kt-fólk, so hava vit eina vælvirkandi og nýskapandi kt-vinnu við høgum førleikum, og røtt stig eru tikin politiskt til at útbúgva fleiri kt-fólk á Setrinum.

Talan er um eina stóra uppgávu, sum krevur eitt haldgott samstarv millum myndugleikar og vinnu, har partarnir binda seg til at fremja neyðugu broytingarnar og skapa teir neyðugu karmarnar. Myndugleikar og starvsfólk skulu harumframt førleikamennast, og løgfrøðin stuðla undir einari ábyrgdarfullari nýtslu av nýggjari tøkni.





### 9. ÁTAK:
## Størri gagnnýtsla av Landsfólkayvirlitinum

Landsfólkayvirlitið er ein tann týdningarmesta grundarskráin, tá ið talan er um talgilding av samfelagnum. Í fyrstu heildarætlanini vórðu fleiri týðandi átøk framd. T.d. gjørdust dátur úr fólkayvirlitinum ókeypis at brúka og lættari atkomuligar umvegis Heldina.

Enn eru tó fleiri átøk átrokandi fyri at skapa karmar fyri enn meiri effektiviseringum:

- **Atgongd hjá vinnuni til p-talið**
  Privata vinnan skal, eins og almennir myndugleikar, kunna brúka P-talið sum eintýdda eyðmerking. Hetta er ein fortreyt fyri, at vinnan kann fáa størri gagn av m.a. Samleikanum. Hetta ger talgildingina tryggari og munadyggari fyri alt samfelagið. Hetta verður gjørt við lógarbroyting.

- **Útlendingar við knýti til Føroyar fáa P-tal**
  Lógarbroyting er ávegis, har útlendingar sum hava tilknýti til Føroyar, men ikki búgva her, í ávísum førum, kunnu fáa P-tal. Tørvurin er íkomin, tí ávísir áhugapartar, t.d. bankar og TAKS, hava kundar, sum hava tørv á einum Samleika. Dømi er ein grannskoðari ella bókhaldari, sum arbeiðir fyri eina føroyska fyritøku, og sum tí skal hava atgongd til netbanka og Vinnugluggan.

- **Effektivari skráseting av andláti**
  Mannagongdin í sambandi við andlát krevur nógv samskifti millum myndugleikar. Umframt at hetta er til ampa fyri tey avvarðandi, er hetta umsitingarliga tungt og kann elva til feilir. Málið er at effektivisera hesa mannagongd.

- **Ymsar tillagingar í kt-skipanini**
  M.a. sjálvvirkandi skráseting av innlendis flytingum, dagføring av skipanini í sambandi við flytingar í Norðurlondum, rætting av hentleika til skráseting av ættleiðingum, og dagføring av upplýsingum hjá persónum, ið eru fluttir av landinum.

### 10. ÁTAK:
## Knýta persónsdátur í Norðurlondum saman

Nógvir føroyingar merkja sviðan av, at einki knýti er millum føroyska og serliga danska fólkayvirlitið, har nógvir føroyingar eisini eru skrásettir. Hetta sæst einamest innan sjúklingaviðgerð, har nógvir føroyingar skulu til Danmarkar í viðgerð. Tá føroyskur sjúklingur kemur til Danmarkar, verður hann skrásettur við donskum P-talið (CPR-nr). Av tí at einki knýti er millum føroyska og danska p-talið, ber ikki til at knýta persónsupplýsingarnar saman. Hetta hevur við sær, at upplýsingar um sjúklingin ikki koma aftur til føroyska sjúkrahúsverkið, og kann tað hava týðandi avleiðingar fyri sjúklingin. Henda avbjóðing ávirkar ikki einans sjúklingar, men sæst eisini aftur á øðrum økjum.

Landsstýrið hevur sett sær fyri at loysa hesa avbjóðing við í fyrsta lagi at fáa í lag samstarv við danskar myndugleikar um at knýta fólkayvirlitini saman. Ítøkiliga at P-tøl, skrásett í fólkayvirlitinum um føroyskar borgarar, skulu kunna knýtast til tey donsku p-tølini, sum somu borgarar hava í CPR skránni. Hetta við at knýta persónsupplýsingar saman millum fólkayvirlit (Identity Mapping), er eisini komið á breddan í norðurlendskum høpi (m.a. í Norðurlandaráðnum) og verður roknað sum ein loysn, sum veruliga kann loysa partar av avbjóðingunum á markamótum í Norðurlondum, og skal tað tí í øðrum lagi setast i verk í samstarvi við hini Norðurlondini



### 11. ÁTAK:
## Ríkisstovnar nýta talgilda undirstøðukervið

Ríkisstovnar í Føroyum vilja veita føroyingum sínar tænastur talgilt við loysnunum hjá Talgildu Føroyum. Bæði Føroya Politi og Føroya Rættur vilja veita sjálvgreiðslur á Vanganum og at senda brøv í Mínboks. Hetta kann t.d. vera at biðja um revsiváttan á Vanganum og fáa parkeringsbót í Mínboks. Borgarar fáa stóran ágóða av slíkum tænastum, tí øll neyðug atlit verða tikin til dátuvernd og kt-trygd, tá ið samskift verður umvegis Talgildu Føroyar.

Ein forðing fyri at hetta hevur eydnast er, at persónsdátur millum føroyska og danska fólkayvirlitið ikki eru knýttar saman, sí átak 10. Harumframt eru ríkisstovnarnir knýttir í danskt kt-kervið, har borgarar eru skrásettir við CPR-nr, og kunnu tí ikki brúka loysnirnar hjá Talgildu Føroyum, har eintýdda eyðmerkingin hjá borgarum er p-talið.

Tá átak 10 er avgreitt, er málið, í samstarvi við ríkisstovnarnar, at knýta Føroya Politi, Føroya Rætt og Ríkisumboðið í kervið hjá Talgildu Føroyum.

### 12. ÁTAK:
## Samleikin brúkast uttanlands

Síðan farið var í holt við at menna Samleikan, hevur málið verið, at borgarar skulu kunna brúka Samleikan at avgreiða síni viðurskifti talgilt uttanlands. Samleikin er tí mentur og rikin soleiðis, at hann lýkur ES lóggávu fyri talgildar samleikar. Tað eru gjørdar royndir at fáa Samleikan góðkendan, í fyrstu atløgu í Danmark, men tað hevur víst seg, at uppgávan gjørdist ov stór og torgreidd.

Við at knýta fólkayvirlitini í Norðurlondum saman, sí átak 10, hava vit betri fortreytir fyri at fáa hetta framt. Tá átak 10 er avgreitt, er málið at fáa danskar myndugleikar at loyva føroyingum at rita inn við Samleikanum til útvaldar danskar talgildar tænastur sum t.d. *sundhed.dk, borger.dk og optagelse.dk.*

### 13. ÁTAK:
## Talgild kirkjubók

Í samstarvi við Fólkakirkjuna er ætlanin at seta hol á at menna eina talgilda kirkjubók. Fólkakirkjan ynskir ráð og vegleiðing frá Talgildu Føroyum til hesa verkætlan. Ein talgild kirkjubók gevur borgarum, Landsfólkayvirlitinum og Fólkakirkjuni stórt gagn.

### 14. ÁTAK
## Ein almenn bankakonta

Stovnar og fyritøkur, sum gjalda út pening til borgarar og fyritøkur, hava ofta avbjóðingar við at rinda út á røttu kontu. Við einari sentralari, løgligari góðkendari, almennari kontu, sum borgarin sjálvur umsitur á Vanganum, kundu hesir stovnar og fyritøkur spart munandi umsitingarútreiðslur.

### 15. ÁTAK:
## Nýtsla av nýggjari tøkni

Saman við vinnu, kommunum, Sjúkrahúsverkinum, Fróðskaparsetrinum og øðrum viðkomandi áhugapørtum verður ein langtíðarætlan gjørd fyri, hvussu vit á besta hátt taka nýggja tøkni so sum vitlíki (AI), tólmenni (Robotics), talukennara og tólnet (IoT) í nýtslu.

Vit eru í eini tøkniligari skiftistíð, og tøkni sum vitlíki fær ein alt størri leiklut í okkara samfelagi og kann verða við til at loysa fleiri av okkara grundleggjandi avbjóðingunum.

Eyðsýnt er, at landið fær stórt gagn burturúr at taka nýggja tøkni í brúk. Automatisering av fyrisitingarligum uppgávum kann økja um góðskuna og spara tíð hjá myndugleikum. Vitlíki kann effektivisera og betra góðskuna av m.a. snarkanningum av krabbameini og ger tað møguligt at brúka persónligan heilivág til viðgerð.

Innan m.a. heilsu- og eldrarøkt eiga vit at hava dirvi til at royna tøknina saman við m.a. granskarum á Fróðskaparsetri Føroya og vinnuni. Um almenni og privati geirin, saman við granskingini, taka hesa avbjóðing á seg, kunnu Føroyar gerast undangonguland í verkseting av ítøkiligum ágóðum av hesum nýggju tøkniligu kollveltingunum.

Landsstýrið hevur sum mál at leggja eina heildarætlan fyri vitlíki, sum skal seta út í kortið hvussu samfelagið fær sum mest burturúr tøknini og hvussu vit verja okkum sum frægast fyri váðunum. Byrjast skal við at gera forkanning av hesum í 2025. Úrslitið av hesari forkanning verður ein nýggj heildarætlan fyri vitlíki.

# FYLGISKJAL:

# ÍLØGUÆTLAN FYRI ÁRINI 2025-2027

Í hesum fylgiskjali eru íløgurnar fyri átøkini í heildarætlanini kostnaðarmett, og býtt yvir ár, í mun til nær átøkini verða ment og sett í verk.

# SAMLAÐ YVIRLIT

| Átak nr. | Heiti | 2025 | 2026 | 2027 | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Ein myndugleiki fyri talgilding** | | | | |
| 1. | Skipan av landsmyndugleika [1] | - | 1,0 | 2,5 | 3,5 |
| 2. | Samskipan millum land, kommunur og vinnu [2] | - | - | - | - |
| | **Samanhangandi tænastur til borgarar og vinnu** | | | | |
| 3. | Vangin 2.0 – útbreiðsla og endurhugsan | 4,0 | 4,0 | 4,0 | 12,0 |
| 4. | Savna heilsutænastur á Vanganum [3] | 0,5 | 0,5 | 2,0 | 3,0 |
| 5. | Mínboks 2.0 – vinna og endurhugsan | 2 | 1,5 | 3,0 | 6,5 |
| 6. | Skjáttan 2.0 – útbreiðsla og funkur | 1,5 | 2,0 | 3,0 | 6,5 |
| 7. | Talgilt val [4] | 1,0 | - | - | 1,0 |
| 8. | Vinnutænastur á einum stað | 3,0 | 5,5 | 9,0 | 17,5 |
| | **Munadygg umsiting** | | | | |
| 9. | Ábøtur á fólkayvirlitinum [5] | - | - | - | - |
| 10. | Flutningur av persónsdátum í Norðurlondum [6] | 2,0 | 2,0 | - | 4,0 |
| 11. | Ríkisstovnar knýta í Talgildu Føroyar [7] | 0,5 | 0,5 | 1,0 | 2,0 |
| 12. | Samleikin brúkast uttanlands | 1,0 | 2,0 | - | 3,0 |
| 13. | Talgild kirkjubók [8] | - | - | - | - |
| 14. | Ein almenn bankakonta | - | 1,0 | 0,5 | 1,5 |
| 15. | Nýtsla av nýggjari tøkni (vitlíki) [9] | 0,5 | - | - | 0,5 |
| | **Í alt** | **16,0** | **20,0** | **25,0** | **61,0** |
| | *harav váðaískoyti á 20%, og* | *2,7* | *3,3* | *4,0* | *10,0* |
| | *Prísvøkstur á 3%* | | *0,6* | *0,7* | *1,3* |
| | **Fíggjarkarmur í alt** | **16,0** | **20,0** | **25,0** | **61,0** |
| | Játtan á fíggjarlóg | 10,0 | 15,0 | 20,0 | 45,0 |
| | Inntøkur/fremmand fígging [10] | 6,0 | 5,0 | 5,0 | 16,0 |

***1)*** *Talan er um at stovnseta nýggjan myndugleika, herundir at seta 2-3 starvsfólk. Talan er um fasta setan, sum sostatt kemur at ávirka raksturin framyvir.*

***2)*** *Útreiðslur ísv. samskipan verður roknað sum partur av dagliga rakstrinum og tí ikki nøkur serskilt útreiðsla.*

***4)*** *Útreiðslur ísv. at talgilda valkortið verða goldnar av kommunum, fólkakirkjuni og løgmálaráðnum. (Inntøkur/fremmand fígging)*

***5)*** *Ábøtur á fólkayvirlitið verða goldnar av Umhvørvisstovuni. Mett verður, at 1 mió. átti at verið sett av til hetta árliga. Av tí at tað ikki er greitt, um henda fígging er tøk er einki sett av til hetta átak.*

***6)*** *Henda verkætlan verður væntandi goldin av verkætlanini nýtt THS hjá Sjúkrahúsverkinum (Inntøkur/fremmand fígging).*

***7)*** *Ríkisstovnar rinda sjálvir fyri útreiðslur ísv. at knýta í talgilda undirstøðukervið (Inntøkur/fremmand fígging).*

***8)*** *Fólkakirkjan rindar sjálv fyri menning av talgildari kirkjubók. Henda verkætlan er ikki kostnaðarmett enn, men kann hon gerast sum ein tillaging av KT-skipanini hjá fólkayvirlitinum, sum er ætlanin hjá Fólkakirkjuni, kundi hetta leysliga mett verið gjørt fyri 3-5 mió. kr. Av tí at óvissan er stór er einki tal ásett í talvuni.*

***9)*** *Settar eru 0,5 mió. kr. av til at gera forkanningar, heildarætlanir o.l. ísv. nýtslu av nýggjari tøkni. Um farið verður víðari eftir hesa forkanning, skal hetta gerast í serstakari játtan til vitlíki.*

***10)*** *Talan er um allar inntøkur/fremmand fígging, frá hesum postum:*

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 3. | Vangin 2.0 – útbreiðsla og endurhugsan | 2,0 | 2,0 | 2,0 | 6,0 |
| 4. | Savna heilsutænastur á Vanganum [3] | 0,5 | 0,5 | 2,0 | 3,0 |
| 7. | Talgilt val [4] | 1,0 | - | - | 1,0 |
| 10. | Flutningur av persónsdátum í Norðurlondum [6] | 2,0 | 2,0 | - | 4,0 |
| 11. | Ríkisstovnar knýta í Talgildu Føroyar [7] | 0,5 | 0,5 | 1,0 | 2,0 |
| | **Í alt** | **6,0** | **5,0** | **5,0** | **16,0** |
| 13. | Talgild kirkjubók [8] | - | - | - | 2,0 - 5,0 |
| | **Í alt við talgildari kirkjubók** | | | | **18,0–21,0** |

TALGILDU
**FØROYAR**
0 1 1 0 0 1 1 0  0 1 1 0 1 1 1 1

**Høvuðsskrivstovan**
Gjaldstovan
Kvíggjartún 1, FO-160 Argir
Tlf: +298 35 24 00
talgildu@talgildu.fo

**Brúkaratænastan**
Staravegur 9, 100 Tórshavn
Tlf: 1881
1881@talgildu.fo